# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Herferð móti Landssjúkrahúsinum

Landssjúkrahúsið hevur mangan verið í brennidepli. Orsøkin hevur oftast verið, at árlig játtan ikki hevur rokkið. Tá so hevur verið, er oftast tikið til tey vanlukku ráð at skerja virksemið, ein loysn, sum elvir til stórar trupulleikar á stovninum. Tað er dýrt at reka eitt nútímans sjúkrahúsverk í landi sum okkara. Tá hartil kemur, at vit hava ein sjúkrahúsbygnað, sum upprunaliga varð skaptur til eitt oyggjasamfelag við einum heilt øðrvísi undirstøðukervi, er ikki løgið, at raksturin er tungur. Í staðin fyri at taka allan sjúkrahúsbygnaðin upp til seriøsa viðgerð, verður okkara meginsjúkrahús ferð eftir ferð politisk kastibløka hjá politikkarum, sum ikki tora at taka um notuleggin og kalla ein spaka fyri ein spaka. Í staðin fyri at staðfesta, hvat tað kostar at reka eitt nútímans hypermodernað meginsjúkrahús við broyttum funktiónum og nýggjum uppgávum, so verður ár eftir ár endurtikin ein rituellur glæntrileikur, har tað tykist mest umráðandi at finna syndabukkar enn at staðfesta ein ótespiligan veruleika og seta viðkomandi spurningar.

Við hesum bakstøði er fyri so vítt einki nýtt orðaskiftinum í vár um Landssjúkrahúsið. Hesin stovnur hevur snøgt sagt ongan góðan í politikki, meðan vinirnir hjá hinum báðum stovnunum ikki tróta. Tað, sum veruliga er nýtt, er, at ein partur av pressuni er farin undir eina miðvísa herferð, sum tykist at hava til endamáls at sáa iva um læknafakligu førleikarnar á Landssjúkrahúsinum. Avvarandi leiðslur á stovninum tykjast hava valt at venda hin kjálkan til høggini, sum javnt og samt eru fallin til læknafakligu førleikarnar á Landssjúkrahúsinum.

Men nú hevur so ein av yvirlæknunum í lesarabrævi her í blaðnum í gjár loyst frá posabandinum og við hvøssum orðum víst atfinningunum aftur. Í roynd og veru talaði viðkomandi til fánýtis at í lesarabrævi longu í oktober 2007. Nú talar maðurin so at fyri aðru ferð og rekur aftur ein týðandi part av atfinningunum, sum hann nevnir destruktivar og lýsir sum einvísa propaganda. Hann ger vart við, at mistøk kunnu henda, men sigur í sama andadrátti: Efter et langt livs virke i det danske sygehusvæsen vurderer jeg, at Landssyghuset er fuldt på højde med et almindeligt dansk centralsygehus. Lesarabrævskrivarin mælir til avvegaðan tíðindaflutning og konstruktivan kritikk heldur enn hatursherferð. Tað er neyðugt við øðum lagi til tess at fáa starvsfólk við góðum fakligum førleikum at støðast og søkja størv á Landssjúkrahúsinum.

Vit kunnu bert taka undir við manninum og standa sum so mong onnur spyrjandi yvir fyri eini óskiljandi og ódámligari herferð, sum verður rikin móti Landssjúkrahúsinum.

**Sosialurin**

## Anders Fogh Rasmussen er ein steinur...



SJÚRÐUR SKAALE

**Forsætisráðharrin ofraði sannleikan á tí partapolitiska altarinum, tá hann gjørdi Norðuratlantsbólkin samsekan í, at Danmark broytir støðu til hvalaveiðu**

Anders Fogh Rasmussen ákærdi í gjár Norðuratlantsbólkin á fólkatingi fyri at hava medábyrgd av, at Danmark brýtur eina avtalu við Føroyar, og gongur ímóti føroyskum ynskjum í altjóða hvalaveiðifelagsskapinum IWC.

Fogh vísti á, at Norðuratlantsbólkurin er í valbólki við andstøðuni. Tað er andstøðan sum vil hava Danmark at broyta kós – og tí er Norðuratlantsbólkurin samsekur.

Tá henda ákæra verður sett fram í Føroyum, er tað sjálvandi fyrst og fremst mær, hon er vend ímóti. Tað hevur einki misljóð verið millum meg og forsætisráðharran ta tíðina eg havi verið á fólkatingi, og tí harmar hetta meg. Tí ákæran er burtur úr vón og viti. Eg kundi tað sama sagt sum Erasmus Montanus á sinni: Ein steinur dugir ikki at flúgva; Anders Fogh Rasmussen dugir ikki at flúgva – ergo er Anders Fogh Ramussen ein steinur...

**Tekniskt samstarv**

Tað er rætt, at vit eru í valbólki við andstøðuni. Men at vera í valbólki merkir ikki at vera samdur ella at føra sama politikk. Tað er eina og aleina eitt tekniskt samstarv. Sjálvstýris- og Fólkaflokkurin eru í valbólki í Føroyum. Tað merkir ikki, at Kári á Rógvi hevur ávirkan á ella ábyrgd av tí, sum Jørgen Niclasen ger.

Tað er satt, at Norðuratlantsbólkurin kundi staðið sterkari í hesum máli. Tíverri segði Lars-Emil Johansen seg kunna "liva við" at Danmark broytti støðu, tí hann helt, at hetta kundi geva Grønlandi onkrar aðrar fyrimunir í staðin. Men hetta hevði ikki avgerandi týdning.

**Føroysk sjónarmið undir samráðnum**

Og eg gjørdi ið hvussu er tað, eg kundi. Umframt óformligt prát við politikarar, segði eg hesi orð, tá uttanríkisráðharrin varð kallaður í samráð um málið tann 11. juni.

"Eitt danskt orðafelli sigur, at tað besta ofta er tann størsti fíggindin hjá tí góða.

Tað er eftir øllum at døma ein meiriluti av politikarunum á fólkatingi sum heldur, at tað besta í hvalaveiðuspurninginum er at taka undir við teimum londum, ið ynskja hvalareservat við Antarktis.

Harvið ger hesin meiriluti seg til fíggindа hjá tí góða. Við tað góða meini eg, at IWC yvirhøvur er til. Tí fáa "friðingarlondini" ov stórt vald, er veruligur vandi fyri, at hvalaveiðulond verða so ónøgd, at IWC dettur sundur. Og so missir altjóða samfelagið allar møguleikar fyri at stýra hvalaveiðuni.

Við tað góða meini eg eisini samstarvið millum Danmark, Føroyar og Grønland um hesar spurningar, sum hevur tryggjað, at ynskini hjá Føroyum og Grønlandi í flestu førum eru fylgd.

Og við tað góða meini eg eisini tað góða huglag, sum verið hevur millum Danmark og Føroyar tey farnu árini.

Tí hetta er ógvuliga prinsipielt. Og tað er eingin ivi um, at vónbrotið verður sera stórt í Føroyum, um Danmark nú fer at bróta avtaluna og siðvenjuna um, at danska stjórnin skal fylgja okkara ynskjum í IWC. Føroyska støðan er sum kunnugt, at røtt umsiting av havsins tilfeingi er ikki friðing, men burðardygg veiða. Men danska stjórnin talar og atkvøður jú vegna føroyingar í IWC – vit hava onga rødd og onga atkvøðu. Tí er greitt, at viðurskiftini versna, um meiriluti fólkatingsins stendur við sítt krav.

Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, eigur rós fyri, at hann hevur virða føroysku og grønlendsku ynskini. Eg skilji væl ta truplu støðu, hann er komin í, nú ein meiriluti á fólkatingi ynskir at ganga ímóti áhugamálunum hjá Føroyum og Grønlandi. Men eg vil loyva mær at minna á, at Uffe Ellemann Jensen kom í somu støðu, tá hann var uttanríkisráðharri. Og hann metti hetta vera so grundleggjandi, at hann gekk ímóti fólkatinginum.

Eg veit, at tað illa ber til at krevja av einum ráðharra, at hann skal ganga ímóti sínum egna parlamenti, men eg vil heita á Per Stig Møller um ið hvussu er at taka málið upp við føroyskar myndugleikar áðrenn hann ger, sum meirilutin vil hava hann at gera."

Uttanríkisráðharrin tó væl ímóti orðunum, og lovaði at venda sær aftur til føroyskar myndugleikar.

**Partapolitikkur**

At bróta eina avtalu við Føroyar er sjálvandi ein stór avgerð, sum er trupul at taka. Tí er eitthvørt signal úr Føroyum, sum kann legitimera avgerðina, sera kærkomið.

Og tað kom eitt slíkt signal úr Føroyum. Teir donsku politikarar, sum brutu avtaluna við Føroyar, fingu eitt heilt avgerandi argument úr Føroyum.

Tað kom ikki frá Norðuratlantsbólkinum. Tað kom frá partamanni forsætisráðharrans, Edmundi Joensen, sum alment fegnaðist um nýggju donsku støðuna.

Altso: Vit hava tveir føroyskar fólkatingslimir. Annar mótmælti avgerð fólkatingsmeirilutans um at broyta kós. Hin fegnaðist um hana.

Men sambært Fogh var tað maðurin, sum mótmælti at kósin varð broytt, sum hevur ábyrgdina av, at hon varð broytt...

Hetta er jú vitleyst. Tað visti Fogh, tá hann segði tað. Men tá tey partapolitisku áhugamálini skulu røkjast, er sannleikin ofta tað fyrsta, sum verður offrað.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.